

*Tilvildarlig mynd*

vit vilja hava, og hvat innihaldið í honum skal vera. Hetta eigur kjakið fyrst og fremst at snúgva seg um, heldur Páll Isholm. Hann hevur tí eisini fleiri ferðir sagt sína hugsan alment um skúlaskap og avbjóðingar í framtíðini.

– Eg sakni kjak og meiningar á politiska pallinum um veruliga innihaldið í undirvísingini. Tað tykist vera nógv lættari at hava eina meining um alt annað, t.d. bygningar, skúlagarðar, foreldrasamstarv, tímatal og leiðslubygnaðir, heldur enn at hava meiningar um innihaldið í tí, sum fer fram í skúlastovuni. Tá meiningar hendinga ferð eru frammi um innihaldið, snúgva tær seg um bátasmíð, kvøðing og kristni. Men vit tosa tá um at varðveita mentan og siðaarv og ikki um sovorðið, sum hevur við avbjóðingar í framtíðini at gera. Tað áttu vit at tosað nógv meira um, sigur Páll Isholm.

Hann skrivaði herfyri eina kronikk undir heitinum »Framtíðin í bíðistøðu,« har hann m.a. vísti á, at føroyingar vita væl, hvat er rætt at gera innan skúlaøkið, men megna ikki at gera tað. Vit gagnnýta ikki tær milliardaíløgur, sum eru gjørdar í samferðslukervið, og brúka ov nógvan pening upp á skipanir, sum tíðin langt síðan er farin frá. Vit effektivisera okkum ikki og verða tí ikki kappingarfør. »Vit halda fast í eini farnari og dýrari fortíð, samstundis sum vit vilja inn í eina effektiva og framskygda framtíð. Hetta er eitt paradoks, sum ikki letur seg gera, og sum kostar okkum dýrt hvønn einasta dag. Bæði í pengi og dygd,« skrivaði hann.

## Sama lærara í 10 ár

Hann nevndi m.a., at í Eysturoynni og Norðoyggjum eru sjey framhaldsdeildir, sum hava eitt og sama endamál, nevniliga at útbúgva ungdómar í 8., 9. og 10. flokki. Mesta fjarstøðan millum hesar sjey framhaldsdeildirnar er 35 kilometrar. Kortini verður hildið fast við hesa sundurbýting, og úrslitið er, at kanska á ongari framhaldsdeild er fakliga støðið nóg høgt og mennandi. Hann skrivaði eisini, at summastaðni verður enn hildið fast við, at flokkar skulu hava sama flokslærara í samfull 10 ár, ja, helst helst eisini sama føroysktlærara og roknilærara. Einlæraraskipanin er sostatt framvegis í gildi, og neyvan samsvarar hon við nýmótans námsfrøðilig krøv, helt hann.

»Ímynda tær felagsskapin av børnum, sum ikki fekst at rigga í barnagarðinum, sum so fekk ein vánaligan og kanska ótolnan flokslærara í 1. flokki, ið tey hingu uppá, líka til tey skuldu á miðnám. Hvussu hava hesi børnini tað, hvussu hevur skúlin og fyri tann skuld barnagarðurin megnað sína uppgávu? Hvussu nógv føroysk børn hava upplivað nakað líknandi í sínum nærumhvørvi, og hvussu nógv børn ynskja vit skulu uppliva hetta í framtíðini,« spurdi Páll Isholm í kronikkini. Hetta og mangt annað verður umrøtt á seminarinum, sum Rigmor Dam, Helgi Rasmussen og hann sjálvur skipa fyri á Føroya Fólkaskúla 10. mars.

*ua@sosialurin.fo*

### FAKTA:

Rigmor Dam, Helgi Rasmussen og Páll Isholm skipa 10. mars fyri reflektiónsseminari á Føroya Fólkaháskúla um fólkaskúlan

Tey vilja hava kjakið at snúgva seg um annað enn tímatal, bygningar og stríðsmál millum áhugabólkar. Hvussu fæst skúlin at hóska til nútíðina, er høvuðsspurningurin

PISA-kanningin í 2009 vísti, at føroyskir næmingar eru ringast fyri av teimum norðurlendsku. Føroyar vóru aftast bæði í lesing, støddfrøði og náttúruvísindum

Í PISA-kanningini varð staðfest, at støðan var javnt góð ella vánalig í ymsu skúlunum. Tvær orsøkir til vantandi innlæring vóru ónøktandi undirvísingaramboð og órógv

PISA-kappingin í 2009 vísti eina ávísa framgongd í lesing samanborið kanningina í 2006, sum skelkaði alt samfelagið. Men framgongdin var lítil